# Dystaðust leygardagin á tamb

*Um vikuskiftið skipaði Mjølnir fyri stórari flogbóltskapping, sum bar heitið Gullkonto Cup. 75 lið høvdu boðað frá luttøku, og allan leygardagin varð leikt í 4 ymsum hallum*



Nógv varð lagt fyri, tá ungu leikararnir skuldu royna kynstur síni leygardagin…

JÁKUP MØRK

Sum kunnugt skipaði flogbóltsfelagið Mjølnir fyri stórari flogbóltskapping fyri yngru deildirnar hjá øllum flogbóltsfeløgum í landinum um vikuskiftið.

Frammanundan var roknað við stórari luttøku, og tá tað kom til stykkis, vóru eisini heili 75 lið, sum høvdu boðað frá luttøku.

Ein av orsøkunum til stóra luttakaratalið mundi helst vera, at tað fyri fyrstu ferð var møguligt at melda lið til í aldursbólkinum undir 9 ár. Framman undan hevur yngsti bólkurin verið tey, sum eru undir 12 ára gomul, so sjálvandi vóru fleiri lið, sum nú meldaðu til í yngsta bólkinum.

### 4 hallir

Umframt at luttakaratalið varð somikið stórt, so noyddust fyrireikararnir eisini at taka hædd fyri, at allir dystirnir máttu avgreiðast leygardagin, tí KÍ høllin skuldi nýtast til annað endamál sunnudagin.

Hetta førdi við sær, at tað fyri fyrstu ferð gjørdist neyðugt at nýta heili fýra hallir at avgreiða dystirnar í.

Vanligt hevur verið, at umframt KÍ høllina og høllina í skúlanum á Ziskatrøð, hevur eisini staðið Mjølni í boði at nýta skúlan á Fossanesi um á stendur, og soleiðis varð eisini hesu ferð.

Hetta var tó ikki nóg mikið, og tískil mátti høllin á Viðareiði eisini takast í nýtslu, til tess at avgreiða allar dystirnar.

### Gekk væl

Sjálv kappingin gekk ógvuliga væl, og seinkingarnar vórðu ikki tær heilt stóru. Tó hendi tað í einum aldursbólki, at óvanliga nógvir dystir endaðu 2-1, soleiðis at nakrar skjótingar komu í.

Hetta førdi við sær, at summi lið ikki megnaðu at leika allar dystirnar, áðrenn tey skuldu vestur ella suður, men kortini halda tey har norðuri, at kappingin yvirhøvur gekk so væl, sum til ber.

Byrjað var klokkan 9.00 um morgunin, og seinastu dystirnir vórðu ikki leiktir fyrr enn klokkan 21.30, so av sonnum kann sigast, at talan varð um ein strævnan dag hjá leikarunum ikki minst hjá fyrireikarunum.

### Úrslitini

Allar kappingarnar vórðu sjálvandi avgjørdar við einum finaludysti, umframt at leikt varð um triðja plássið, og fingu trý tey fremstu liðini handa steyp og heiðursmerki, sum Norðoya Sparikassi hevði latið.

Einasta kappingin, sum ikki varð avgjørd har norðuri, var kappingin hjá yngstu gentunum. Her hendi tað nevnliga at TBa og TBb komu í finaluna, og tá tað var um reppið, at gentunum lukkaðist suður aftur leygarkvøldið, varð gjørt av, at taka steyp og heiðursmerki við sær, fyri síðani at avgera dystin har suðuri.

Úrslitini av kappingini gjørdust annars hesi:

**Gentur 9 ár**
1 Fleyr a/Fleyr b
3 Mjølnir

**Gentur 12 ár**
1 TB a
2 Mjølnir
3 TB b/KÍF a

**Gentur 14 ár**
1 SÍ
2 Fleyr
3 TB

**Gentur 16 ár**
1 KÍF a
2 KÍF b
3 Fleyr

**Kvinnuunglingar**
1 TB
2 Mjølnir
3 Fram

**Dreingir 9 ár**
1 TB
2 Mjølnir
3 SÍ

**Dreingir 12 ár**
1 SÍ
2 Fleyr a
3 ÍF

**Dreingir 14 ár**
1 Fleyr
2 SÍ a
3 SÍ b

**Dreingir 16 ár**
1 Fram
2 SÍ
3 Mjølnir

**Mansunglingar**
1 Fram
2 SÍ
3 Nøvan

Frásagnir frá dystunum í bestu mans- og kvinnudeildini í flogbólti verða við í blaðnum í morgin

# Djóni aftur í Runavík

*Runavíkingar halda á fram at styrkja um hópin, og hesu ferð er tað B36, sum kennir sviðan av at missa leikara til Runavíkina*

Tíðliga í vetur sá tað út til, at NSÍ so at siga skuldi byrja av nýggjum í bestu fótbóltsdeildini, men nú hava teir í Runavík tryggjað sær so mikið góða og roynda manning, at tað má metast, at Trygvi Mortensen fer at hava eins holla manning í ár, sum hann hevði í fjør.

Í gjár visti heimasíðan hjá NSÍ at siga, at nú hevur felagið gjørt avtalu við Djóna Nolsøe Joensen um, at hann skal spæla við NSÍ komandi ár. Fótbóltsligu uppalingina fekk Djóni í NSÍ. Hann var átjan ára gamal, tá hann í 1991 kom á fyrsta lið, og tá hann í 1996 flutti til B36, hevði hann í fleiri ár verið millum berandi kreftirnar.

Djóni var í 1997 við til at vinna FM við B36. Í 1998 spældi hann millum lítið og einki, men í fjør var hann aftur í 1. liðs hópinum hjá B36, sum nú hevur mist enn ein av teimum, sum í fjør mannaðu besta liðið.

JH



*…og mangan mundi nógv standa á, tá leikarar skuldu blokka, heva og smasha*
***Myndir: Símun á Høvdanum***



# Útisetar vunnu elektroniskan talvdyst

*Talv: Við nærum sterkastu manning vunnu útisetar ein tryggan sigur móti føroyingum í Føroyum. Tiltakið eydnaðist sera væl sjálvt um heili 2000 kilometrar vóru millum telvarnar*



CARL ELI NOLSØE SAMUELSEN

Nýggjar hurðar eru nú opnaðar innan talvheimin. Tað sást leygardagin í netcafé Orbits, tá átta sterkir føroyskir telvarar her heima bjóðaðu átta sterkum føroyskum útisetum til talvdyst. Útisetarnir telvaðu á einari netcafé í Keypmannahavn, tað vil siga at bæði liðini vóru á heimavølli!

Áðrenn dysturin byrjaði var tíðindafundur á skránni. Rani Nolsøe, formaður í talvsambandinum greiddi frá endamálinum við tiltakinum, nevnliga at fáa talv til ein part av teimum nærum óendaligu møguleikunum á alnetinum. Eisini greiddi hann frá hvussu væl hetta aldargamla spæl hóskar seg á netinum.

Eitt tílíkt tiltak er ikki heilt ókeypis, og Rani nýtti tí høvi at takka Føroya Tele fyri stuðulin, og takkaði eisini teimum í Orbits fyri blíðskapin teir sýndu. Marknaðarleiðarin hjá Føroya Tele, Poul Hendrik Poulsen var fegin um at teir kundi stuðla tílíkum tiltaki, og vónaði at samstarvið millum Talvsambandið og Føroya Tele fór at halda áfram.

Eftir tíðindafundin varð klárt at fara í gongd. Teir átta telvarnir settust við spenningi við teldurnar, og síðani varð fyrsti leikurin fluttur á skíggjanum.

Talvið á fyrsta borði millum John Rødgaard og John Arna Nilssen var víst á stórskíggja, og tað riggaði heilt væl. Fitt av fólki høvdu leitað sær oman í Orbits leygardagin.

Tveir dystir vórðu leiktir og úrslitið varð samanlagt **9,5-6,5** til útisetar.

Á fýra teimum ovastu "borðunum" vórðu heimamenn við yvirlutan, men fýra teir aftastu fingu bert eitt stig av átta møguligum.

Samanumtikið eitt sera væl eydnað tiltak, sum helst skjótt verður roynt aftur.

### Liðkappingin

Bert tríggir dystir vórðu telvaðir hetta vikuskifti.

Í triðju deild vann Vestmanna 2,5-1,5 móti Klaksvíkini. Í unglingadeildini vóru bæði havnarliðini í Klaksvík, har Havnin 1 vann 4-0 móti Klaksvíkini 2, og Klaksvík 1 vann 4-0 móti Havnini 2.

Fyrsta og onnur deild telvaðu ikki í vikuskiftinum.

### Kappingar uttanlanda

Flóvin Tór Næs telvar í løtuni í stórari kapping í Spania, ið nevnist Ubeda.

Hann hevur í skrivandi løtu telva fýra talv, og av teimum hevur hann ognað sær tvey stig.

Sera sterk kapping er í løtuni í Hollandi. Kappingin kallast Wijk aan Zee, sum er ein sera traditiónsrík kapping. Har eru allar kanónirnar, eitt nú Kasparov, Anand og Kramnik. Føroyavinurin Predrag Nikolic er eisini í eldinum.

Í skrivandi løtu eru sjey umfør telvd, og ikki óvæntað er Kasparov saman við Kramniki á odda við fimm stigum. Í hølunum á teimum kemur indarin Anand. Nikolic liggur miðskeiðis í hópinum.

Talvið hesa vikuna er úr sjeynda umfari, og her átti heimsmeistarin Garry Kasparov helst at vunnið.

## Úrslitið av talvdysti um alnótina

| | Heimamenn | | Útisetar | 1. | 2. |
|---|---|---|---|---|---|
| 1. | John Rødgaard | - | John Arni Nilssen | _-_ | _-_ |
| 2. | Jens Kristian Hansen | - | Heini Olsen | _-_ | _-_ |
| 3. | Rani Nolsøe | - | Eyðun Nolsøe | _-_ | 1-0 |
| 4. | Ólavur Simonsen | - | Rógvi W. Rasmussen | 1-0 | 1-0 |
| 5. | Martin Brekká | - | Jóan H. Andreasen | 0-1 | 0-1 |
| 6. | Carl E. N. Samuelsen | - | Terji Petersen | 1-0 | 0-1 |
| 7. | Martin Poulsen | - | Heini Danielsen | 0-1 | 0-1 |
| 8. | Hans K. Simonsen | - | Arild Rimestad | 0-1 | 0-1 |






*Vinstrumegin síggjast John Rødgaard og Jens Kristian Hansen, sum umboðaðu tey bæði fyrstu borðini hjá heimamonnum.*
*Høgrumegin, talvið millum John Rødgaard og John Arna Nielsen varð víst við uppvørpu, so áskoðararnir kundu fylgja við*
***Myndir: Álvur Haraldsen***

# Ikki bara talv

*Tað er ikki bara til telving, at alnetið verður nýtt í altjóða ítróttarhøpi*

JÁKUP MØRK

Millum áskoðararnar í Orbits leygardagin vóru eisini onkrir bridgespælarar at síggja, og hesir sýndu stóran áhuga í møguleikunum, sum alnetið hevur at bjóða.

Eins og talv er bridge nevnliga sera væl egnað til at spæla tvørtur um stórar fjarstøður via alnetið, og fyri stuttum hevur ein stór kapping verið, har vinnandi parinum varð tillutað atgongd til heimsmeistarahaeitið, sum verður seinni í ár.

Líkt er sostatt til, at alnetið gevur føroyingum bæði innan- og uttanlands nógv víðari ræsur, tá tað ræður um at finna sær mót- og viðleikarar.

# Talvið hesa vikuna

*Hvítur: Garry Kasparov (2851)*

*Svartur: Viswanathan Anand (2769)*

1. d4 Rif6
2. c4 e6
3. Ric3 Bb4
4. Rif3 c5
5. g3 cxd4
6. Rixd4 O-O
7. Bg2 d5
8. cxd5 Rixd5
9. Fb3 Ric6
10. Rixc6 bxc6
11. O-O Fa5
12. Bd2 Bxc3
13. bxc3 Ba6
14. Rfd1 Fc5
15. e4 Bc4
16. Fa4 Rib6
17. Fb4 Fh5
18. Be3 Be2
19. Rd2 Rab8
20. Bxb6 axb6
21. Fd6 Bf3
22. Fxc6 Bxg2
23. Kxg2 Fe5
24. Fc4 Rfc8
25. Fd4 Fa5
26. Rb1 h6
27. Rb4 Fc5
28. Rd3 Fc7
29. a4 Rd8
30. Fe3 Rxd3
31. Fxd3 Rc8
32. Fb1 Fxc3
33. Rxb6 Rc4
34. Rb8+ Kh7
35. Rb7 f6
36. Re7 Rb4
37. Fa2 Fc4
38. Fxc4 Rxc4
39. a5 Ra4
40. Rxe6 Rxa5
41. Rd6 Ra4
42. Kf3 Ra3+
43. Ke2 h5
44. Rd3 Ra2+
45. Ke3 Kg6
46. h3 Ra4
47. f4 Rb4
48. Ra3 Rc4
49. g4 hxg4
50. hxg4 Rb4
51. Ra6 Kf7
52. Ra7+ Kg6
53. f5+ Kh6
54. g5+ fxg5
55. e5 g4
56. e6 Kg5 _-_